# Ovurstórur eftirspurningur eftir summararbeiði

**529 ungfólk vænta sær kjans at arbeiða hjá Tórshavnar Kommunu í summar. Eftirspurningurin er ovurstórur, men kommunan megnar bert at taka umleið 200 ungfólk í arbeiði**

UNG Í ARBEIÐI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Áhugin hjá ungum eftir at arbeiða hjá Tórshavnar kommunu í summarferiuni er stórur. Fríggjadagin 5. juni var freistin at skriva seg upp farin, og tá samanum kom, høvdu ikki færri enn 529 ungfólk úr allari kommununi skrivað seg upp.

Hetta er munandi meira enn í fjør, tá tað vóru 392 ungfólk, ið skrivaðu seg upp til arbeiði í summarferiuni. Men tað vóru heldur ikki øll, ið fingu arbeiði í fjør. Gott og væl 200 ung fingu bjóðað arbeiði í fjør, og Linda Petersen, samskipari av Ung í Arbeiði hjá Tórshavnar kommunu, væntar at talið verður umleið tað sama í ár.

### Øll vinna

Ung í Arbeiði er eitt átak, har kommunan bjóðar ungdóminum mat gera fyrifallandi arbeiði í summarfrítíðini. Í Tórshavnar kommunu er tilboðið galdandi fyri tey, ið eru millum 14 og 16 ár.

- Vanliga er tað arbeiði so sum at lúka, rudda, mála, gera gøtur, antin nýggjar ella viðlíkahald av verandi, og annars at fríðka um í kommununi. Tey læra jú eisini um at arbeiða, og yvirhøvur tað, at fara upp til arbeiðis. Tey sleppa undan at sita heima, og eg haldi at øll vinna við hesum. Bæði tey ungu, foreldrini og kommunan, sigur Linda Petersen, samskipari av Ung í Arbeiði.

Men tað er ikki einans tey ungu, sum vinna sær hýru og royndir, foreldrini, ið sleppa undan at hava tey sitandi heima alla summarferiuna, og kommunan, ið fær ymiskt arbeiði gjørt, ið vinna við hesum.

- Vit hava eisini gjørt tað møguligt hjá borgarum at koma við uppskotum um arbeiði á kommunalum øki, sum tey ungu kunnu taka sær av. Ofta vita borgararnir í nærumhvørvinum best, hvat tørvur er á, og nú hava teir møguleikan at vísa á hetta, greiðir Linda Petersen frá.

### Avgerðin fellur um eina viku

Nú er freistin at skráseta seg farin, og 529 hava søkt. Men tað verða ikki øll, ið fáa arbeiði, tí tað ikki letur seg gera. Men avgerðin um, hvør sleppur at arbeiða, verður tikin av eini teldu, ið verður sett at draga nøvnini tilvildarliga úr tilmeldingarlistanum.

Hvørt umsøkjarin var fyrstur ella síðstur at skráseta seg, hevur ongan týdning fyri hvør fær tillutað pláss. Teldan velur tilvildarliga millum allar luttakarar, og verður lutfallið eins fyri gentur og dreingir og fyri allar aldursbólkar.

Drigið verður komandi mánadag, tann 15. juni, og tá verður kunngjørt, hvør sleppur at arbeiða.

Í 2009 verður arbeitt í vikunum 27, 28, 29 og 30. Tað er tíðarskeiðið frá 29. juni til 24. juli.



*Tey eru nógv, ið nú standa í bíðirøð eftir at sleppa at arbeiða fyri Tórshavnar Kommunu. Tilsamans eru tey 529 ungfólk, 461 úr Havn, 11 úr Nólsoy, 32 úr Kollafirði, 10 av Velbastað ella Kirkjubø, 10 úr Kaldbak og 5 úr Hesti*

*Savnsmynd*

# Hugurin at berjast lítil í Klaksvík

**Um tað eru ljósu tíðirnar, ið hava bøtt um sinnalagið, ella føroyingar bara berjast minni, er ilt at gita um. Í øllum førum var ógvuliga friðarligt hjá løgregluni, hóast bæði norðoyastevna og truckerfestivalur vóru í Klaksvík um vikuskiftið**




112
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Eitt tað størsta mentanarvikuskiftið í Føroya søgu er júst farið afturum. Í høvuðsstaðnum var mentanarnátt fríggjakvøldið, í Skálabotni var fjørðafestivalur, og í Klaksvík var bæði norðoyastevna og truckerfestivalur í einum.

Hesi tiltøk hava øll í sínum lag savnað eina rúgvu av fólkum, og tá nógv fólk savnast, og veitsluhugurin er í topp á kvøldi, er vanliga eisini skjótt at hugurin at berjast kemur á fólk. Men soleiðis var ikki hetta vikuskiftið.

Í Havn hevur verið óvanliga friðarligt. Klokkan 19.20 leygarkvøldið varð boðað frá, at fýra mans vóru farnir upp at sláast á Vaglinum í Havn. Talan var um fýra russar, og teir vóru tiknir við á støðina at køla av. Neyðugt var við tolki, til tess at fáa tosað við menninar. Tá teir høvdu verið inni eina tíð, vóru teir tó sissaðir og latnir leysir aftur.

Sunnunáttina klokkan 2.49 varð meldað, at tað var eitt størri slagsmál við Steinatún.

Tá løgreglan kom á staðið, vóru fleiri, ið vóru í hornatøkum, men teir sissaðust skjótt. Tó var ein, sum í var verandi í reyða feltinum, og sparkaði og sló. Hann varð handtikin, og verður skuldsettur fyri brot á politiviðtøkurnar.

### Váttligt í Klaksvík

Vikuskiftið í Klaksvíkini var sera friðarligt sum heild. Løgreglan hevur í mestan mun havt við fólk, ið hava fingið ov nógv niðurum, at gera.

Seks ferðirnar hevur løgreglan verið úti og vakt fólk, bæði konufólk og mannfólk. Eingin er tó tikin á støðina.

Tvey herverksmál hava verið. Ein rútur var brotin á einum skonkistaði, og gerningsmaðurin hevði skorið seg. Hann varð koyrdur á sjúkrahúsið. Hetta var leygarnáttina klokkan 2.42.

Klokkan 3.33 vóru tveir mans farnir til hendurs uttanfyri KÍ-høllina, og tað málið varð loyst við at annar persónurin varð sendur til hús.

Ein persónur hevði lagt seg at sova í einum bili, har hann einki hevði at gera, og hann varð vaktur av løgregluni.

Klokkan 4.14 sunnunáttina vóru trý ungfólk í so áhugað í einum bili, ið stóð við sandin. Tey vóru burturvíst tá løgreglan kom á staðið.

Alt í alt er talan um eitt sera friðarligt vikuskifti í Klaksvík, tá havt verður í huga at bæði norðoyastevna og truckerfestivalur hava verið.

Um vikuskiftið er eingin í landinum tikin fyri rúsdrekkakoyring ella ov nógv ferð.

